# Semja eyðkendi veljarafundin í Trongisvági

**Veljarafundurin í Trongisvági í gjárkvøldið varð ov nógv eyðkendur av semju. Semju um, at útjaðarin skal mennast. Semju um, at vælferð og tey bleytu virðini skulu raðfestast hægri. Semju um, at umhvørvið skal verjast. Og semju um, at útbúgving skal fáa størri játtan. Ov lítið varð gjørt við at gera ítøkiligar raðfestingar og at siga tað hart fyri veljaranum**

VELJARAFUNDUR
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

ABC flokkarnir hava úr at gera við at kína hvønnannan við hárunum, nú hálvonnur vika er til valið. Hóast floksleiðararnir vísa á, at "allir møguleikar eru opnir", so bendir okkurt á, at samgonguflokkarnir fegnir vilja halda fram við hesum samstarvinum.

Á veljarafundinum í gjárkvøldið var tað serliga løgmaður, sum hálovaði undanfarnu samgongu. Hóast Høgni Hoydal roynir at koyra grús í maskinaríið hjá ABC, hevur hetta ikki eydnast higartil.

Eingin ivi er um, at ynkisamansetingin hjá løgmanni í løtuni er eitt framhaldandi samstarv millum ABC flokkarnar.

Kringvarpið hevði annars tikið kritikkin av tí fyrsta fundinum til eftirtektar, og hesuferð sluppu onnur valevni ikki framat at seta dagsskránna.

Fundurin var nógv merktur av, at politikararnir ofta vóru samdir um tað endaliga málið, men kappaðust um at taka æruna fyri framstig og at brigsla hvørjum øðrum fyri vanrøkt á øðrum økjum. Veljarin gjørdist tí ikki so nógv klókari.

### Blokkurin?

Kaj Leo Johannesen vildi annars hava eitt kjak um blokkin úr danska statskassanum. Hann eftirlýsti einum kjaki um blokkin. Jóannes Eidesgaard hevur sagt, at Javnaðarflokkurin ongantíð hevur havt nakran trupulleika við donskum pengum, men hann hevur tó eisini róð framundir, at vit við tíðini eiga at loysa okkum frá donskum pengum. Fólkaflokkurin hevur greitt meldað út, at blokkurin við tíðini skal burtur, og at ein breið búskparlig semja skal slóða fyri hesum.

Á hesum økinum er stór ósemja millum samgonguflokkarnar og serliga millum Fólkaflokkin og Sambandsflokkin.

### Endurføðingin hjá Sjálvstýrinum heldur fram

Sjálvstýrisflokkurin hevur veruliga brynjað seg við fleiri spennandi valevnum til hetta valið, og ábendingar eru um, at flokkurin fær tveir tinglimir valdar hesuferð. Á fundinum í gjár gjørdu serliga Kári á Rógvi og Hans Blaasvær vart við seg.

Hans Blaasvær hevur gjørt vart við seg seinastu mánaðirnar í sambandi við mótmæli av raðfestingunum hjá sitandi løgtingi. Hans Blaasvær nýtti aftur høvi í gjárkvøldið staðfesta seg sum tunnilsmótmælismann.

- Hevði eg havt eina milliard, so hevði eg ikki koyrt hana í eitt hol, men heldur brúkt peningin til eitt universitet í Føroyum. Politikkur snýr seg um raðfestingar, segði Hans Blaasvær.

Hetta er ein roynd at seta vælferð og útbúgving upp ímóti útbygging av samferðslukervinum og serliga tí kostnaðarmikla tunlinum til Sandoynna, har vit skulu raðfesta vælferðartænastur og útbúgving framum tunlar.

Á hinum vonginum stóð Páll á Reynatúgvu. Hann ávaraði ímóti einum ófrættakendum ráki, har borgarar landsins verða gjørdir upp í pengum.

- Hvussu nógv kostar ein gásadalskona? Ella hvussu nógv kostar ein dalbingur, spurdi sandoyartingmaðurin retoriskt.

Hesir báðir politikarar ímynda tað stríð, sum hevur tikið seg upp í føroyska samfelagnum seinastu tíðina. Annar vongurin vil broyta raðfestingarnar á fíggjarlógini, soleiðis at t.d. tunlar verða settir meira niðalaga á listanum. Hin vongurin vil hava fleiri útbyggingar á samferðsluøkinum og vilja ikki at seta vælferðina upp ímóti teimum sokallaðu hørðu virðunum.

Hetta hevur eyðkent valstríðið higartil og fer óivað at gerast meira sjónligt framyvir.



*Kaj Leo Johannesen eftirlýsti greiðum útmeldingum frá hinum flokkunum um blokkstuðulin*



*Áhoyrararnir sluppu veruliga til orðanna á valfundinum í Trongisvági. Tíbetur hevði Kringvarpið syrgt fyri, at valevni ikki sluppu at seta dagsskránna*

# Heimsins veðurlag í kreppu

**Nøgdirnar av CO2 í atmosferuni eru tær størstu, sum eru máldar seinastu 650.000 árini. Ein ítøkilig avleiðing er heitari sjógvur kring Føroyar.**

UMHVØRVI
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Jørðin er sum eitt vakstrarhús, har atmosferan er glasið, sum veksur í tjúkd so hvørt CO2 mongdirnar økjast. Størri og størri partur av hitanum, sum sólarljósi verður gjørt um til, tá tað rakar jørðina, sleppur ikki út aftur í rúmdina. Avleiðingin er, at miðalhitin á jørðini veksur orsakað av CO2 og øðrum veðurlagsgassum, sum av mannaávum verða leidd út í atmosferuna.

Hesi seinastu árini er sjógvurin í Norðuratlantshavinum vorðin alsamt heitari. Í Norðsjónum er miðalhitin hækkaður við 1,05 hitastigum, árini frá 1977 til 2001. Sama gongd ger seg galdandi við Føroyar. Í 1993 var miðalhitin við Føroyar 7, 4 hitastig, meðan hann í 2003 var hækkaður til 8,8 hitastig.

- Hetta, at sjógvurin gerst heitari, broytir livilíkindini hjá fiskinum og ávirkar sostatt útbreiðslumynstrið. Tey fiskasløg, sum trívast í heitari sjógvi, kunna flyta seg norðureftir, tí livilíkindini í hesum økinum nú eru vorðin betur. Tað viðførir, at norðara útbreiðslumarkið verður flutt norðureftir. Hjá teimum fiskasløgunum, sum liva í kaldari sjógvi, versna livilíkindini. Hesi kunna flýggja undan varmanum, antin við at flyta seg longur norður, ella fara á djypri vatn, har sjógvurin er kaldari, sigur Eyðfinn Magnussen, lívfrøðingur.

Kanningar av fiski í Norðsjónum vísa, at sjálvur kjarnin í útbreiðsluøkinum hjá nærum 2/3 av fiskasløgunum í Norðsjónum hevur flutt seg. Í flestu førum hava fiskasløgini flutt seg longur norður, men tað eru eisini tey, sum hava flutt seg suðureftir og onkur teirra standa djypri í dag enn fyri 25 árum síðani.

- Vit hava ikki nakrar nágreiniligar kanningar í Føroyum, men glýsufiski, sum fyrr bara fanst á Føroya Banka, er nú at finna á landgrunninum. Kjaftsvartur kongafiskur, sum áður einans helt til sunnanfyri Føroyar, er tey seinnu árini komin munandi longur norður, so hann eins og glýsufiskurin kann sleppa í kaldari sjógv.

### Altjóða ábyrgd

Hóast føroyska útlátið ikki telur nógv í altjóða samanhangi, so mugu Føroyar eins væl og onnur lond taka síni tøk fyri at minka um útlátið av veðurlagsgassum. Føroyar eru millum tey lond, sum útleiða mest av CO2 í mun til fólkatalið.

Staðfestast kann, at Føroyar vóru ov seinar á sjóvarfallinum í mun til Kyoto-tilgongdina. Samstundis eru heimsins lond farin undir at gera nýggja, altjóða avtalu, sum skal avloysa Kyotosáttmálan.

## FAKTA

- Hvat kann løgtingið gera:
- Seta í verk ítøkilig tiltøk, sum virka fyri at minka um føroyska CO2 útlátið – evt. fyri hvørja vinnugrein og húsarhald
- Áseta CO2 kvotur
- Seta í verk fíggjarlig stýringsamboð – so sum serligt gjald á CO2 útlát
- Áseta krøv til bjálving av bygningum
- Stuðla verkætlanum, sum hava til endamáls at menna orkusparandi skipanir til m.a. fiskiskip og øðrum orkukrevjandi vinnum
- Menna orkukeldur, sum eru grundaðar á varandi orku
- Vera við í tilgongdini nú avloysarin fyri Kyoto skal gerast

*Sosialurin og Rás2 seta fokus á náttúru- og umhvørvismál. Í Sosialinum síðstu dagarnar hava vit umrøtt ymisk viðurskifti á økinum, og í kvøld klokkan 1930 verða náttúru- og umhvørvismál evni á politiskum Trapputingi í Miðlahúsinum. Trapputingið, ið verður skipað í samstarvi við Lívfrøðingafelagið, verður sent beinleiðis á Rás2.*